# Kavaælingur og gott sýni



*Esbern koyrir fremstur í konvojuni við nýggja kavaruddaranum*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Sosialurin var við, tá kavaruddararnir á flogvøllinum í Vágum fóru til arbeiðis tíðliga ein leygarmorgun beint fyri nýggjár**

REPORTAGA
*Edvard Joensen*

Tað kavar framvegis. Eitt æl kemur spakuliga inn gjøgnum Sørvágsfjørð. Soleiðis hava líkindini verið alla nátt. Esbern, Birgir og Jógvan eru farnir út á vøllin við hvør sínum plógvi, meðan Andrias ruddar framman fyri terminalinum, og Bjarni ger klárt at kanna, hvussu hálur vøllurin er.

Tað er ein lítil tími, síðan telefonin ringdi, og Bjarni boðaði frá í hinum endanum, at hann hevði givið fólkinum boð at møta klokkan seks at rudda vøllin. So har var bara at skunda sær á dyr og vera á vøllinum, áðrenn teir byrjaðu, um ein skuldi fáa nakað við.

Klokkan er knappliga seks hendan seinasta leygarmorgunin í farandi øldini. Alt er so reint og nossligt. Kavin liggur um túnini. Nýkomin kavi. Niðurkomin í nátt. Eingin slóð. Einki, sum óruddar ella órrógvar friðin.

Tær rennur í huga danska sangin: »Der er ingenting i verden så stille som sne...«

Hann fýkur eitt sindur í lítla lotinum og legst í smáum aldum - ov smátt til at kalla skalv - har eitt sindur av læ er.

Bilurin stendur har so fittur púra fjaldur av kavanum, sum lagstur er oman yvir hann. Tað verður ruddað um hurðarnar, so inn slepst. Havi verið so fyrivarin í gjárkvøldið at sproyta olju í lásið, so tað skuldi ikki verið fryst. Men eg átti ongan avísara at sproyta á rútin, so har er ivaleyst alt samanlopið.

Og so er. Tá eg havi sett í gongd, er at fara at rudda av rútunum. Men har er alt ísur undir kavanum. so einki annað er at gera enn at bíða, til bilurin er ornaður so frægt inna, at tað fer at tiðna av forrútinum. Hiti er í bakrútinum, so hann verður avísaður tann vegin. Viskararnir er frystir fastir, so ikki er ráðiligt at taka ov harðliga í, so teir ikki skrædna.

Ája, eitt sindur seinkaður av hesum komi eg út á flogvøllin. Fartelefonin ringir og Bjarni er aftur í hinum endanum.

Hvar eg eri? Jú, eg eri júst komin til terminalin. So er bara at koyra yvir til stóra portrið, so fær hann vaktarmannin í torninum at lata mær upp, so eg kann koma yvir til tornið, har teir halda til.

Og har sita teir so og leggja dagin til rættis. Ikki tí, hetta hava teir gjørt so ofta, at hvør væl veit, hvat hann skal gera. Men hugnaligt er kortini at byrja við einum kafimunni. Og nú fremmandur maður er komin við at síggja, hvussu gjørt verður, er at greiða honum frá sum frægast, so hann fær eina hilling á, hvat tað er, sum fer fram.

Vit fara út í garaguna, har maskinurnar standa. Teir hava latið stóru huðrina upp, so vit ikki kvalast beinanveg, teir seta í gongd.

Maskinur er kanska ikki rætta orðið at brúka um hesi tólini, tí í veruleikanum er tað stórir lastbilar, sum útgjørdir eru við plógvi, bustum og blásarum, sum senda kavan langvegis út av vøllinum, so hvørt teir koma sópandi. Tríggir eru teir í tali, sum skulu út í morgun, umframt tann lítla traktorin, sum Andrias fer við, og jeepin, sum Bjarni koyrir í til tess at máta hálkuna, tá ruddað er.

Vit báðir, Bjarni, fara út á vøllin aftan á teimum, sum grava, fyri at síggja, hvussu tað verður gjørt. Í grundini sera einfalt. Teir koyra í ringi á vøllinum. Allir tríggir á rað. Eitt sindur forskotið, so teir taka kantarnar hvør eftir øðrum. Soleiðis aftur og aftur í ring. Satt at siga eitt troystarleyst arbeiði, sum ongan enda tykist taka, men kortini má gerast.

Onkur skemtilig sál hevur reinaferð sagt, at tað at grava kava, er sum at fáast við konufólk. Rok í erva og hált í neðra. Tað var helst sagt um teir hjá Landsverkfrøðinginum, sum eisini skulu á fjøllini.

Nú eru vit ikki so ovarlaga, at tað skuldi gjørt tað stóra fyri rok. Men tá turrur kavi er og eitt lot, fýkur beinanveg íaftur, har grivið verður. Og soleiðis eisini her.

Vit koyra við jeepinum aftan á teimum stóru kavaruddarunum fyri at kanna, hvussu út sær. Tað kavar aftur, men nú ikki tjykri enn so, at vit síggja kavaruddaran hjá Landsverkfrøðinginum fara blinkandi gult út eftir Bíggjarvegnum. Men so mikið er kortini, at tað rýkur eitt sindur aftur á vøllin, so Bjarni noyðist at biða teir, sum rudda, um at fara afturumaftur.

Vit koyra inn aftur móti torninum. Nú skal hálkan á vøllinum kannast, eftir at teir eru lidnir at rudda. Og tað verður ikki gjørt við bara at koyra skjótt og bremsa hart.

Nei, her er tøkni uppií. Eitt tól, teir nevna tað My-Metur, verður hongt upp í sleipirókin á jeepinum. Hetta stendur so í samband við eitt málitól inni í bilinum, har Bjarni lesur ymisk data. Tað fer soleiðis fram, at hann við ávísari ferð á bilinum fær nøkur virði upp á rútin, sum so siga, um vøllurin er góður ella ringur, sum Bjarni tekur til. Hægri tølini eru, betri er statt við hálkuni.

Jú, tað sær út til, at vøllurin er á góðari leið, heldur Bjarni. Hann hevur hug at taka ein túr aftrat líkasum til eina eyka trygd. Men meðan vit koyra, er ein brestur at hoyra. Vit tosa um, at tað man neyvan vera nakar, sum er farin at skjóta harur longu her í lýsingini. Bjarni fer út og er skjótur aftur og sigur, at tað var annað hjólið á My-Metrinum, sum var punkterað.

So her gerst einki uttan at fara inn aftur í garaguna at bøta. Tað er Andrias óførur til, heldur Bjarni, so hann verður róptur inn aftur at taka sær av havarínum. Og tað er beinanveg, at hann hevur dekkið av og finnur lekan. So er bara at seta á aftur. Sannlíkt tykist, at hann hevur roynt hetta fyrr.

Teir eru lidnir at rudda flogvøllin. Men enn er okkurt smávegis eftir inni við terminalin, nú Andrias varð tikin úr tænastu og gjørdist bøtari. Men tað man fara at bera til at fáa gjørt kortini. Og tíðin nærkast nú til, at fólk fara at koma til fyrsta flogfarið, so aðrar uppgávur hjá vaktini skulu býtast út.

Vit hittast aftur í køkinum og fáa okkum ein kaffimunn, meðan Bjarni setir fólkið út til ymsu uppgávurnar, teir nú skulu til, nú sjálv kavaruddingin er fingin frá hondini.



*Bjarni hyggur at punkteraða hjólinum á My-Metrinum*

*Mynd: Edvard Joensen*



# Fleiri túsund hava ógildugt koyrikort

**Bileftirlitið hevur gjørt av, at gomlu pappírskoyrikortini ikki longur eru gildug. Tí skuldu øll við gomlum koyrikorti áðrenn 1. januar rinda 250 krónur fyri at skifta tað út við nýtt plastikkort. Men enn koyra fleiri túsund uttan gildugt prógv**

KOYRIKORT
*John Johannessen*

15.000 føroyingar hava higartil skift ljósareyða danska pappírskoyrikortið út við eitt nýtt føroyskt ES-koyrikort úr plasti.

Fyri hetta hava teir 15.000 bilførararnir higartil rindað 3.750.000 krónur í kassan hjá Bileftirlitinum, sum hevur umsitið koyrikortini síðani tey nýggju komu. Tað kostar nevniliga 250 krónur at skifta koyrikortið, hóast tað stendur á gamla koyrikortinum, at tað er galdandi fleiri ár fram í tíðina, og hóast tú ikki ert dømdur at missa koyrikortið.

Hetta er helst ein av orsøkunum til, at tað enn eru millum 2.000 og 5.000 føroyskir bilførarar, ið vanta at skifta út koyrikortið. Tað ber ikki til at fáa eitt neyvt tal yvir, hvussu nógvir bilførarar ikki hava skift koyrikort, tí yvirlitið hjá Bileftirlitinum yvir gomlu koyrikortini er ikki so gott. Men Bileftirlitið staðfestir kortini omanfyri nevnda tal.

## Brúkarin skal rinda

Á Bileftirlitinum halda tey tað ikki vera órættvíst, at tú sum bilførari skalt rinda fyri at fáa skift ógildaða koyrikortið út við eitt nýtt gildugt koyikort.

– Tað mugu vera tey, sum hava brúk fyri at skifa út koyrikortið, ið rinda fyri at skifta tað út. Hin møguleikin hevði verið, at tað varð rindað yvir skattin, men hetta hevði verið órættvíst fyri tey, sum ikki hava brúk fyri tí. Tað er ikki rætt, at gamla konan í Svínoy skal rinda fyri eitt koyrikort, hon ikki hevur brúk fyri, sigur Bjarni Sørensen á Bileftirlitinum.

Bjarni Sørensen sigur, at Bileftirlitið hevur roknað upp á prísin fyri at skifta koyrikortið í sambandi við, hvat hetta kostar í umsiting hjá Bileftirlitinum. Niðurstøðan er, at prísurin er á góðari leið, staðfestir hann.

Er roknistykkið hjá Bileftirlitinum rætt, mugu vit staðfesta, at nýggja koyrikortið hevur verið ein dýrur umsitingarligur umgangur hjá hesum almenna eftirlitsmyndugleika. Higartil hava 15.000 fólk rindað 3.750.000 krónur fyri at skifa koyrikortið, og um 3.000 vanta at skifta út kortið, skulu koyrikort skiftast fyri 750.000 krónur afturat. Tað vil siga, at koyrikort skulu skiftast fyri í minsta lagi 4,5 milliónur krónur, áðrenn allir føroyingar við gomlum donskum koyrikorti hava fingið nýtt føroyskt ES-koyrikort. Og samsvarar hetta við umsitingarliga kostnaðin hjá Bileftirlitinum, hevur tað kostað meira enn 4 milliónir bara at skifta út gomlu koyrikortini.




*Føroyskir bilførarar hava higartil rindað 3,75 milliónir krónur fyri at skifta út koyrikort, sum teir ikki eru dømdir at missa. Bileftirlitið heldur ikki, at hetta er órættvíst*

*Myndviðgerð: Álvur Haraldsen*

## Kann gerast dýrari

Ert tú ein av teimum mongu føroyingunum, sum enn ikki hevur rindað fyri at dagføra koyrikortið, kann hetta gerast ein dýrur smeitur fyri teg. Gamla koyrikortið hevur ikki longur gildi sum prógv um, at tú hevur loyvi at koyra bil. Tíført tú bót fyri ikki at hava koyrikortið uppi á tær, verður tú steðgaður av løgregluni og vísir fram eitt av gomlu koyrikortunum.

– Hóast tú ikki hevur skift koyrikortið út, merkir tað ikki, at tú ikki longur hevur loyvi at koyra bil og tískil kann takast fyri at koyra uttan loyvi. Trupulleikin er bert tann, at tú hevur ikki prógv fyri, at tú kanst koyra bil, og tað fært tú bót fyri, sigur Bjarni Sørensen frá Bileftirlitinum.

Bíðitíðin at fáa nýtt koyrikort er í løtuni drúgv, men tey, ið venda sær til Bileftirlitið ella eina av løgreglustøðunum kunnu fáa eitt fyribils koyriloyvi, til tey fáa nýggja koyrikortið.

# Andras Mortensen verja doktararitgerð

**9. februar skal 40 ára gamli Andras Mortensen verja doktararitgerð á Sjómansskúlanum. Hann hevur latið úr hondum bókina »Hin føroyski róðrarbáturin«, og hon skal nú standa sína roynd**

DOKTARARITGERÐ
*Stefan í Skorini*

9. februar fáa vit væntandi enn ein føroyskan doktara. Tá skal Andras Mortensen nevniliga verja verkið um føroyska róðrarbátin, sum hann hevur skrivað. Bókin varð útgivin síðst í november í fjør.

Ritgerðin skal verjast á Føroya Sjómansskúla, og tað er eisini eitt hóskandi stað, tá ritgerðin er um føroyska bátin.

Andras Mortensen væntar og vónar, at hann klárar at verja ritgerðina, tí hann hevur frammanundan tryggjað sær, at alt er í lagi við bókini.

– Um eg ikki hevði tryggjað mær frammanundan, at alt var í lagi við bókini, so hevði hon ikki verðið útgivin, sigur Andras Mortensen, sum hevur fingið onnur at meta um bókina, áðrenn hon varð prentað.

Andras Mortensen er hampuliga sannførdur um, at ritgerðin verður góðkend, men hann leggur afturat, at har skal avgjørt ein innsatsur til, um tað skal eydnast honum at gerast doktari.

Andras Mortensen sigur, at hann ikki fer at fyrireika seg nakað serligt til júst hetta høvið, tí tann besta fyrireikingin er at skriva bókina.

Opponentar vera Jóan Hendrik Winther Poulsen, professari á Fróðskaparsetri Føroya, Bjarne Stoklund, professari í etnologi á Københavns universiteti og Arne Emil Christensen, professari í arkeologi á Oslo universiteti, ið arbeiðir sum leiðari á víkingaskipshúsinum í Oslo. Hann er ein av teimum fremstu vísindamonnunum á hesum økinum.



*Andras Mortensen, skal verja doktararitgerð um føroyska bátin*

## Leingi á veg

Nú eru góð tíggju ár síðani, at Andras Mortensen fór undir at savna tilfar til hetta verkið, men hann hevur bara arbeitt burturav við hesi bókini tey seinastu tvey árini.

– Eg fór undir at savna tilfar, tá eg kom í starv á fornminnissavninum fyri tíggju árum síðani, men fyrstu árini arbeiddi eg bara av og á við tí evninum. Fyri tveimum árum síðani fór eg at arbeiða burturav við bókini um føroyska róðrarbátin, sigur Andras Mortensen.

Andras hevur eisini verið uttanlands í granskingararbeiðnum. Í 1997 var hann í Noregi á Stavanger Sjøfartsmuseum í fimm mánaðir í sambandi við granskingarbeiðið. Andras Mortensen sigur, at hetta uppihaldið veruliga setti gongd á og gav honum miklan íblástur.

Í innganginum skrivar Andras, at framløgan fevnir um eitt tíðarskeið uppá umleið 250 ár. Frá miðskeiðis í 17. øld, haðani tær elstu upplýsingarnar eru, til umleið 1925, tá leiklutur bátsins í gerandislívinum tók at halla, tí maskinorkan var komin.

Andras Mortensen er 40 ára gamal, og hann er útbúgvin søgufrøðingur á universitetinum í Keypmannahavn í 1987. Hann hevur síðani 1989 starvast á Føroya Fornminnissavni, har hann hevur tikið sær av bátasavninum.

Andras Mortensen er bara annar, sum hevur vart doktararitgerð í Føroyum. Tann fyrsti var Jóannes Dalsgaard, sum skrivaði um Fylking, arbeiðararørsluna á Tvøroyri.